# Magna Aðunsson í Norðoya Kunningarstovu

**Landslagið í Norðoyggjum og barnaárini í Klaksvík er nakað av tí, sum hevur givið íblástur til málningarnar hjá Magnu Aðunsson, sum hendan mánaðin hevur framsýning í Kunningarstovuni í Klaksvík**

Magna Aðunsson hevur búð nógv ár í Íslandi, har hon eisini av álvara byrjaði at royna seg sum listakvinna. Um tíðina í Íslandi sigur Magna, at umhvørvið var sera kveikjandi, bæði tá tað ráddi um tekni- og málihættir, men eisini í tí praktiska arbeiðinum við at ramma inn og og seta framsýningar upp.

Magna hevur nomið sær kunnleika um list frá lærarum á Listaskola Islands, Hægri lærustovni í Aberdeen, á Thorstedlund Kunsthøjskole í Danmark og eisini á Føroya Lær-araskúla, har hon tók lærarautbúgving við list sum sergrein. Hon hevur búð í Føroyum síðani fyrst í nítiárunum og hevur havt hópin av framsýningum bæði her heima, í Íslandi, Noreg, Svøríki og Danmark.





Um íblásturin til sínar málningar sigur Magna soleiðis

- Mínar naturalistisku landslagsmyndir verða til í eini samanseting av náttúruupplivingum og tí innara universinum, tí innara landslagnum. Eg gjørdist tíðliga sera hugtikin av náttúruni rundan um meg. Tað kennist sum at upplivingar, myndir og hugløg frá barnaárunum hava sett seg føst á nethinnuna, og tað kann onkuntíð verða til mystiskar og abstraktar málningar, sigur Magna.

28 akrylmálningar eru við á framsýningini í Norðoya Kunningarstovu, sum er opin allan apríl mánað.

**ave**

# Framtíðin hyggur at framtíðini



*Núverandi og framtíðarborgarar í Klaksvík. Frá vinstru: Matilda Hansen, Kristin Norðoy Wilhelmsen, Erika Johnsdóttir Færø og Jákup Poulsen*

Býráðið í Klaksvík fær stundum vitjan av skúlaflokkum og ymiskum ungdómi.

Nú ein dagin komu børn frá Dr. Margrethu barnagarði í Klaksvík at forvitnast eftir, hvussu og hvar borgarstjórin í Klaksvík "búði". Tey hildu, tað vera sera fínt inni, men børnini vóru meiri áhugaði í at fáa at vita, hvat tað var fyri nakað spennandi, sum stóð á borðinum hjá borgarstjóranum: Eitt modell av miðbýnum. Borgarstjórin, Steinbjørn O. Jacobsen, royndi at greiða frá tí komandi miðbýarætlanini, og børnini komu við áhugaverdum spurningum og uppskotum um aðrar og enn meira spennandi mátar at útbyggja og broyta miðbýnum.

So borgarstjórin fekk nógv at hugsa um, nú hann stóð við framtíðini í Klaksvík, sum hugdi at síni framtíð í Klaksvík.

## Fyrst konsert og síðani kapping

**Tvær konsertir verða í Føroyum í sambandi við at tólv næmingar úr musikkskúlaskipanini fara til kappingina Berlingske Tidendes Klassiske Musikkonkurrence, sum verður í Keypmannahavn 16. apríl**

### KONSERT

Konsertirnar verða í Listaskálanum 9. apríl kl. 19 og í Fríðrikskirkjuni á Toftum 13. apríl kl. 19.30.

Næmingarnir eru úr Havn, Gøtu, Sandi, Toftum, Runavík, Vestmanna, Oyndarfirði og Vágunum.

Tey luttakandi eru:

Saga Kapnas, Margit S. Mikkelsen, Høgni R. Hansen, Kristina Heinesen, Mattias Kapnas, Marita Johansen, Katrin H. Petersen, Oluf Dam, Jákup H. Lützen, Rebekka Hjørleivsdóttir, Kamilla Ravnsfjall og Josef H. Olsen.

Tey spæla á klaver, violin, blokkfloytu, floytu, klarinett og bariton.

Spæld verða verk eftir: Shostokovich, Telemann, Kuliev, Bach, Vivaldi, Weber,

Debussy, Dvoràk, Kreisler, Saint-Saens,

Chaminade og Rachmaninov.

Tilsamans eru um hundrað vald út at verða við, og føroyskir næmingar hava staðið seg sera væl, men ongantíð áður eru fleiri føroyskir næmingar valdir sum hesaferð.

Hin 17. apríl, framføra næmingarnir verkini á Norðuratlantsbryggjuni.

**sb.**



*Tey hava vant, og nú skal venjingin standa sína roynd í tónleikakapping í Danmark*

## Økja kvinnupolitiska virksemið í Føroyum

**Havn:** Mánakvøldið kl. 19:30 verður fundir í Norðurlandahúsinum, hvørs endamálið við fundinum er at økja tað kvinnupolitiska virksemið.

Á fundinum fer landsstýrismaðurin, Hans Pauli Strøm at greiða frá uppskotinum frá Útnorðurráðnum til samtyktar. Hetta uppskotið snýr seg um at seta eina nevnd at arbeiða fyri, at kvinnur fáa ein øktan leiklut í at taka politiskar avgerðir.

Aftaná fer Rúna Sivertsen at greiða frá, hvat tær hava arbeitt við í útnorðurbólkinum, og hvat skal henda framyvir, meðan Annika Olsen fer at tosa um evnið: Skulu vit í skúlan fyri at broyta hugburðin og vekja áhugan hjá kvinnum fyri politikki?

Síðani fer Eyðun Andreassen at hugleiða um spurningin: "Hví gongur tað so striltið at fáa kvinnur aktivar, og er tað neyðugt? Verjir tað demokratiið um fleiri kvinnur verða politiskt aktivar? Ella skulu kvinnur verða verandi í køkinum?".

Eftir hann fer Øssur Winthereig at tosa um evnið: "Skulu vit útbúgva valevnini til at koma í fjølmiðlar? Hvat kann ein krevja av valevnum ella fólkavaldum í samband við valsendingar í fjølmiðlum? Er tað í lagi at jounalistar kasta "runubløk" eftir fólkavaldum?".

Marjun í Kálvalíð fer eisini at luttaka við Stand up comedy, við einum spískum, skemtiligum vinkli til kvinnur, menn og politikk.

**sb.**